From: Árni Skaale <ArniS@logting.fo>
Sent: fríggjadagur, 19. desember 2025 14:17
To: Løgting <logting@logting.fo>
Subject: VS: Suðuroyartunnilin

Til fíggjarnevndina

Undurritaði setti í samband við viðgerðina av málinum um suðuroyartunnilin fram spurning, sum ikki bleiv svaraður.

Eftir at hava tosa við Teit Samuelsen, samdust vit um, at eg skuldi senda hendan spurningin skrivliga til hansara, og tað havi eg gjørt í dag.

Fyri at hetta kann vera partur av viðgerðini í nevndini, verður avrit av spurninginum sendur tykkum.

Vinaliga

Árni Skaale

Spurningur:

Í uppritinum hjá skjótt arbeiðandi arbeiðsbólkinum broti 4.1 stendur:

- Arbeiðsbólkurin metir, at breiður og flatur tunnil niður úr Skúvoy kann gagna trygdini, og arbeiðsbólkurin mælir til at hetta verður kannað nærri, tí tað sæst ikki í tilfarinum, um hetta er blivið kannað fyri annað enn tann tronga og reysta tunnilin upp í Skúvoy.

Tað skilst, at við "breiður og flatur" meina teir, at hann ikki skal vera smalur og brattur, men vera so víður og hava so lágan stigning at stórir bilar sum t.d. lastbilar og brandbilar líka lættliga skulu kunna koyra upp har, sum aðrar staðir.

Teir skriva eisini í broti 5 um vágametingar:

- Tó undrast arbeiðsbólkurin á páhaldið, um at ein rýmingarleið upp í Skúvoy ikki skal vera til gagns fyri trygdina, og mælir til at hetta verður kannað nærri, tí loysnin við einum breiðum flatum tunli niður frá Skúvoy, tykist ikki vera viðgjørd í nakrari váðameting enn.

Teir skriva eisini í niðurstøðuni í broti 6:

- Umframt hetta kann ein breiður, flatur tunnil niður úr Skúvoy veita eyka trygd undir arbeiðinum í mun til tað, at tað gert møguligt at stytta longsta tein inn til tunnilsbenið, har sprongt verður til 9 ella 10km . Hetta er bæði galdandi fyri loysnina frá Sandi og frá Djúpadali. Møguliga kann rýmingarleið gjøgnum breiðan, flatan tunnil niður úr Skúvoy eisini betra um trygdina í endaliga tunlinum, sum tí eigur at vera kannað betri, enn tað higartil er kannað fyri ein smalan, reystan tunnil upp í Skúvoy.

Teir skrivaðu sostatt í uppritinum, at tað tá í veruleikanum ikki var kannað, um ein víður tunnil við lágum stigningi upp í Skúvoy kann bøta um trygdina, men bert fyri eina smalan og brattan har niðurstøðan var, at ein slíkur onki hjálpir trygdini.

Hevur tunnilsfelagið kannað hetta nú?

Um ja, hvar liggur kanningin at lesa og hvat er niðurstøðan?

Um nei, hví er hetta ikki gjørt?

Átti hetta ikki at veri gjørt áðrenn støða verður tikin til hvør loysn verður vald?